SUNDA KOMMUNA

# Fólk til Dagtilhaldið

Søkt verður eftir fólki at skipa fyri Dagtilhaldinum á Oyri at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er í fyrstu syftu sett til 10 tímar um vikuna og lønt verður sambært galdandi sáttmála.

Umsóknir skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. august 2007.

Nærri fæst at vita um starvið á tlf. 471022 ella 771023

**Sunda kommuna**
**Oyrarbakkavegur 3**
**400 Oyrarbakki**

FVE FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection

# Dekkarar

## til Fiskiveiðieftirlitið

Trý størv sum fulltiknir dekkara á skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys, at seta sum skjótast.

Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars taka lut øllum skipsarbeiði.

**Førleikakrøv:**
- Lýkur krøvini sum fulltikin dekkari sambært kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk.
- Heilsuváttan fyri sjófólk, uttan avmarkingar og skikkaður til kagtænastu.
- Trygdarskeið. Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.
- Prógv, so sum brúgvavaktarhald, frc, bátaførara, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Og starvið er lønt í lønarflokki 4. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Skrivlig umsókn við: **CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum**, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 5. september 2007 kl. 1400.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskiveiðieftirlitið Postsmoga 347 110 Tórshavn

*Nærri upplýsingar um størvini, kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.*

Vágs Kommuna

# Pedagogur/hjálparfólk til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir Pedagogi/hjálparfólki til frítíðarskúlan hjá Vágs Kommunu, at byrja 1. oktober 2007.

**Starvið umfatar:**
At arbeiða 25 tímar um vikuna.

Vit ynskja, at tú dugir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum:

- Dámar væl at verða úti
- Ert kreativur
- Hevur gott foreldra og starvsfólkasamstarv

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til leiðaran Sørin Richardt tlf. 374036/229482

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 10. september 2007 kl. 12.00.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Umsóknin skal sendast til:**
VÁGS KOMMUNU
Vágsvegur 22
FO-900 VÁGUR
Viðm. »pedagogur/hjálparfólk«



# Til sølu

Opel Vivaro vøruvognur. Diesel 1.9, hevur oljufýring.

Koyrt 11.500 km. Árg. 2004.

**Tlf. 315508 / 225673**

TVØROYRAR KOMMUNA

# Starvsfólk til Dagstovnin Mýrifípan í Trongisvági

**Søkt verður eftir:**
**Einum pedagogi ella hjálparfólki** til barnagarðsstovu fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, starvið er 30 tímar um vikuna og verður í tíðarskeiðnum 9. septembur 2007 til 1. apríl 2008. Á stovuni ganga 20 børn í aldrinum 3 til 6 ár.

**Einum hjálparfólki** til Útibarnagarðin 30 tímar um vikuna at byrja skjótast møguligt eftir 1. septembur. Í Útibarnagarðinum ganga tey elstu børnini 5 til 7 ár; 20 børn.

**Einum pedagogi, ergoterapeuti,** ella ein við aðrari viðkomandi útbúgving til stuðulstoymið. Starvið er 30 tímar um vikuna. Í stuðulstoyminum starvast í løtuni ein pedagogur og ein fysioterapeutur.

**Vit vænta av tær m.a.:**
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- At tú hevur góð samstarvsevnir og kann arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnini
- At tær dámar væl at verða úti og dugir at læra børnini at fáa áhuga og virðing fyri náttúruni

**Til stuðulstoymið haravtrat:**
- At tú dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum
- At tú ert før/ur fyri at gera menningarætlan fyri hvørt barnið og arbeiða út frá tí
- At tú kanst samstarva við aðrar fakbólkar
- At tú dugir væl at orða teg munnliga og skrivliga

**Vit kunnu bjóða tær m.a.:**
- Eitt gott arbeiðspláss í støðugari menning
- At skapa og seta tín dám á gerandisdagin
- 20 góðar starvsfelagar
- Virðing og álit

**Stovnslýsing**
Dagstovnurin Mýrifípan er ein dagstovnur í Tvøroyrar Kommunu. Stovnurin er í 5 eindum, 1 vøggustova, 12 børn 0-3 ár, 2 barnagarðsstovur á 20 børn 3-6 ár, útibarnagarður 20 børn 5-7 ár og stuðulstoymið, ið arbeiðir fyri allan stovnin. Stuðulstoymið er viðgerandi, ráðgevandi og vegleiðandi fyri børn, starvsfólk og foreldur.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Guðrun Petersen, virkandi leiðara á tlf. 37 27 00.

**Løn**
Størvini verða lønt sambært sáttmála villum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ella avvarðandi fakfelag.

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða Dagstovninum Mýrifípuni, Smærugøta 8, FO 826 Trongisvágur í hendi innan 1. septembur.